## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Føroya Banki 50 ár í Klaksvík

**Týsdagin 15. november var móttøka í Føroya Banka í Klaksvík í sambandi við 50 ár eru liðin síðan bankin setti á stovn eina deild í Klakvík**

MÓTTØKA
*Myndir: Bárður Lydersen*



*Hans Petur Clementsen, deildarleiðari í Føroya Banka, handar Hera Ellingsgaard frá Klaksvíkar Hornorkestri gávukekkin upp á 25.000 krónur*

Nógv fólk vóru til móttøkuna og røður vórðu hildnar av Hans Peturi Clementsen, deildarleiðara, Jóhan Páll Joensen, nevndarformanni, Janusi Petersen, forstjóra og borgarstjóranum í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen.

Undir móttøkuni sang eisini Arnfríð Lützen og Rani Nolsøe pældi gittar.

Klaksvíkar Hornorkestur fekk ein gávukekk upp á 25.000 krónur frá bankanum við tí grundgeving at hornorkestrið ger eitt gott arbeiði fyri býin við at møta upp nær tað skal vera og í øllum veðri um okkurt er at heiðra.

Tað áhugaverda við stovningardegnum er, at sama dag í 1955 læt Sjóvinnubankin eisini eina delid upp í Klaksvík undir navninum Norðoya Banki. Nú eru so báðir bankarnir samanlagdir við búmerkinum hjá gamla Sjóvinnibankanum.


*Hans Petur Clementsen, deildarleiðari, Jóhan Páll Joensen, nevndarformaður, og Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka*


*Niclas Heri Jákupsson, deildarleiðari hjá Føroya Shell, Jákup Jensen úr Havn, og Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.*


*Finngerð Joensen og Óluva Klein, starvsfólk í bankanum*


*Arnfríð Lützen sang undir móttøkuni*


*Starvsfólk í bankanum, f.v.: Arnhild Christiansen, Mathilda Nolsøe, Karolina Hansen, og Súsanna Christiansen*


*Eyðun Rasmussen, Christian Martin Rasmussen, Jóhan Páll Joensen og Janus Petersen*

† 

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Sofus Andreassen** fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Ebenezer sunnudagin klokkan 14.

Tey, ið vilja minnast Sofus kunnu lata eina gávu til barnalegurnar í Grønlandi. Konto í Føroya Banka.

**Elinborg Mørk Jørgensen**, ættað úr Sandvík, andaðist í heiminum í Keypmannahavn týsdagin 15. november, 55 ára gomul.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## 85 ára føðingardagur

Fríggjadagin 18. november fyllir Kertin Høgnesen, Leirvík, 85 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini Myrnu.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu tá kæri bróður, mammu- og ommubeiggi okkara

**Poul Hammer**
úr Hovi

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar og heilsanir
Takk til starvsfólkið á B6 á Landssjúkrahúsinum, fyri ta tíðina tit vóru um Poul.
Takk øll tit, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og við ervi.
Takk til prest, berarar, organist, sangarar og gravarar.
Takk til tykkum, ið góvu Missiónshúsinum í Hovi gávu.
Hjartaliga takk øll somul.

*Familjunnar vegna*

**Elias og Adina**